## Claus í móti Chelsea

Lutakastið um hvør skal spæla móti hvørjum í fimta umfari av FA Cup er gjørt, og liðið hjá Claus Bech Jørgensen skal møta Chelsea, um teir vinna á Norwich

Um vikuskiftið spældu Blackpool og Norwich javnleik 1-1. Teir skulu tí spæla umdyst fyri at finna út av, hvør teirra skal víðari í FA Cup. Fyrrverandi føroyski landsliðsleikarin, Claus Bech Jørgensen, spælir við Blackpool, og vinna teir umdystin móti Norwich, er næsta mótstøðulið teirra Chelsea.

Hjá Chelsea er hetta vorðið sum lutakast, og hóast Claus og teir fingu júst tað mótstøðuliðið av øllum, teir allar minst høvdu hugsað sær, so eru teir helst spentir upp á stóru uppgávuna. Men fyrst skal dysturin móti Norwich vinnast, áðrenn Claus Bech Jørgensen sleppur at trína inn á Stamford Bridge.



## Petur skal samskipa spælaramenningina

FSF hevur gjørt avtalu við Petur Simonsen, um at hann skal samskipa arbeiðið kring menningina av 11-12 ára gomlu spælarunum

Leikaramenningin fer í gongd í mars mánaði, og tá verður landið býtt í fimm økir, har hvørt øki fær ein økisvenjara knýttan at sær.

Vant verður 1 ferð um vikuna og uppá skift í økinum.

Endamálið við leikaramenningin er í stuttum: At geva tí unga evnaríka leikaranum serliga undirvísing og venjing saman við javnlíkum. At knýta feløg og ungdómsvenjarar í eitt mennandi og landsumfatandi netverk. At rekrutera og menna komandi U-landsliðsleikarar

# Stórur spenningur í Grand Prix kappingini



**Leygardagin varð 4. Grand Prix umfar leikt í Eysturskúlanum í Havn. 80 spælarar úr seks feløgunum høvdu boða frá luttøku**

BORÐTENNIS
*tíðindaskriv*

B71, KÍ, Streymur, Royn, Tór og TBF høvdu øll meldað til kappingina, so roknað við eini sera spennandi kapping.

Og so var. Serliga var tað í A bólkinum, har eingin leikari megnaði at vinna allar sínar dystir. Petur Niclasen var roknaður sum favorittur, men legði út við at tapa ímóti Pæturi Albinus, sum seinni í kappingini tapti tveir dystir ímóti ávíkavist Halli Thorsteinsson og Jákupi Hansen.

Um nú Hallur megnaði at vinna sín seinasta dyst ímóti Ragnari Egilsson við 3-1, so hevði hann vunnið A bólkin. Men so skuldi ikki gangast Halli, sum hevði leikt betur fyrr á degnum. Hann mátti leggja rygg til 3-1 tap og rakk tað hetta bara til annað plássið hjá evnaríka havnarmanninum. Petur vann bólkin við átta stigum, og Hallur gjørdist nummar tvey við seks stigum. Bert tvey sett betri enn Ragnar og fimm betri enn Pætur, sum mátti taka til takkar við einum fjórða plássið, sjálvt um hann í fyrsta dystinum basti Grand Prix vinnaranum fimm tey seinastu árini – Peturi Niclasen.

Undan hesum umfarinum hevði Tóki Thorsteinsson úr Tór megnað at vunnið tríggjar av trimum møguligum bólkum, men leygardagin gekk ikki longur. Hann endaði á fjórða plássi í D-bólkinum, men hóast hetta, so má sigast, at tað er sera gott klára av smádreingjaleikaranum úr Havnini. Harumframt halda Jógvan Johansen Tór og Ólavur Fjørdal TBF fram við tí góða stimanum. Teir hava júst sum Tóki, vunnið tríggjar av fýra møguligum bólkum, sum teir hava luttikið í.

Í øðrum bólkum var eisini sera tætt tá ið stig og sett skuldu teljast upp, so sigast má, at kappingin um at gerast Grand Prix vinnari 2007 er hørð, nú bert tvey umfør eru eftir. Og ikki nokk við tí, tí kappast verður eisini um at vinna sær sæti millum trý tey fremstu í hvørjari deild hjá teimum yngru (undantikið smápinkur og smápiltar), sum gevur atgongd til luttøku í Brøndby Cup, sum veður í Danmark 17. og 18. mars.

Næsta kapping, ið BTSF skipar fyri, er 4. Grand Prix umfar, sum verður í Eysturskúlanum í Havn 10. februar.

## Bólkavinnarar gjørdist:

| | |
|---|---|
| Bólkur A: | Petur Niclasen, Tór |
| Bólkur B: | Rói Agnarsson, Tór |
| Bólkur C: | Sheila Strøm, TBF |
| Bólkur D: | Tróndur Tummasarson, TBF |
| Bólkur E: | Jóel Brimberg, KÍ |
| Bólkur F: | Birita Mortensen, TBF |
| Bólkur G: | Andrias á Roykheggi, Tór |
| Bólkur H: | Teitur Midjord, Royn |
| Bólkur I: | Jógvan Johansen, Tór |
| Bólkur J: | Vár Holm, TBF |
| Bólkur K: | Ólavur Fjørdal, TBF |
| Bólkur L: | Johannes Agnarsson, Tór |

## Samlaða støðan í Grand Prix kappingini eftir 4 umfar:

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Smápinkur** | | | |
| 1 | Anna Mikkjalsdóttur | TBF | 406 stig |
| 2 | Durita Jensen | TBF | 286 stig |
| 3 | Sofía Maria Ferjá | TBF | 264 stig |
| **Smápiltar** | | | |
| 1 | Bjørgvin Sveinbjørnson | Royn | 220 stig |
| 2 | Petur Muller | TBF | 204 stig |
| 3 | Jónas Wentslau | TBF | 172 stig |
| **Pinkur** | | | |
| 1 | Lív Øster | TBF | 252 stig |
| 2 | Eva Wilhelm | TBF | 248 stig |
| 3 | Vár Holm | TBF | 228 stig |
| **Piltar** | | | |
| 1 | Eyðfinnur Jensen | Royn | 326 stig |
| 2 | Hans Jón Jacobsen | TBF | 268 stig |
| 3 | Eyðun Ellendersen | Royn | 246 stig |
| **Smágentur** | | | |
| 1 | Rakul Mikkjalsdóttur | TBF | 1060 stig |
| 2 | Birita Mortensen | TBF | 560 stig |
| 3 | Marin Sofía Brattalíð | TBF | 490 stig |
| **Smádreingir** | | | |
| 1 | Jákup Thomasen | TBF | 1120 stig |
| 2 | Jónhard Ferjá | TBF | 1040 stig |
| 3 | Páll Heri Nolsøe | TBF | 980 stig |
| **Gentur** | | | |
| 1 | Susie Midjord | TBF | 1160 stig |
| 2 | Sheila Strøm | TBF | 1100 stig |
| 3 | Joan Thomasen | TBF | 880 stig |
| **Dreingir** | | | |
| 1 | Hallur Thorsteinsson | Tór | 1370 stig |
| 2 | Rói Agnarsson | Tór | 1300 stig |
| 3 | Fróði Jensen | TBF | 1210 stig |
| **Kvinnuunglingar** | | | |
| 1 | Marin í Dali | TBF | 760 stig |
| 2 | Heidi Olsen | Tór | 428 stig |
| 3 | Mariann Mikkjalsdóttur | TBF | 300 Stig |
| **Mansunglingar** | | | |
| 1 | Pætur Albinus | Tór | 1270 stig |
| 2 | Sjúrður Ferjá | TBF | 1100 stig |
| 3 | Sigurð Carlsson | Tór | 850 stig |
| **Kvinnur** | | | |
| 1 | Elin Øster | TBF | 810 stig |
| 2 | Petra Muller | TBF | 700 stig |
| 3 | Elin Thomasen | TBF | 580 stig |
| **Meistaradeildin** | | | |
| 1 | Petur Niclasen | Tór | 1500 stig |
| 2 | Ragnar Egilsson | Tór | 1350 stig |
| 3 | Jákup Hansen | Streymur | 1280 stig |